# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Bjarni Hammer politistur í Havn




Eftir lokna útbúgving varð Bjarni Hammer hin 1. august 2006 settur í fast starv sum politistur. Bjarni, ið er 31 ára gamal, er ættaður av Tvøroyri og starvast í politistøðini í Havn.

Frítíðina nýtir Bjarni saman við familju og vinum og til seyðahald, umframt at hann eisini íðkar ítrótt. Serliga er tað í ítróttargreinini "kick-boksing", at Bjarni hevur gjørt seg galdandi, og hevur hann m.a. heilar tríggjar ferðir vunnið danmarks-meistarakappingina í "kick-boksing".

Saman við gentu síni Barbaru Brattalíð eigur Bjarni 2 ára gomlu dóttrina Bjartu.

Við hesum verður ynskt Bjarna tillukku og góða eydnu framyvir.

## Rúna Sivertsen fer frá sum formaður í RFF

**Á starvsnevndar-fundi í Ráðnum fyri Ferðslutrygd í dag boðaði Rúna Sivertsen frá, at hon ynskti at verða loyst úr starvinum sum formaður frá 1. september**



*1. september fer Rúna Sivertsen frá sum formaður í Ráðnum fyri Ferðslutrygd*

TÍÐINDASKRIV

Í viðmerking sigur Rúna Sivertsen: „At fáa litið upp í hendur álitisstarvið, sum formaður fyri Ráðið fyri Ferðslutrygd var mær ein æra, og tað er við tung-um hjarta, at eg leggi frá mær.

Orsakað av øktari arbeiðs-byrðu og fjarstøðu frá høv-uðsstaðnum ber mær ikki longur til at røkja hesa upp-gávu so væl, sum eg haldi er neyðugt fyri eina so týdn-ingarmikla uppgávu.

Nú eg fari frá, vil eg nýta høvi enn einaferð at vísa á tað vanlukkuliga í, at tað framvegis ikki er løgd ein heildarætlan fyri ferðslutrygdini í Føroyum.

Tí fari eg enn einaferð at heita á politiska myndug-leikan um at taka arbeiðið við ferðslumálum í størri álvara, og eg mæli til:

- at ein landsvirkisætlan verður gjørd fyri ferðslu í Føroyum
- at landsstýrið setir fólk at arbeiða við ferðslumálum burturav
- at ferðslumál verða flutt í Innlendismálaráðið, har tey natúrliga hoyra heima

Rúna Sivertsen hevur verið formaður í Ráðnum fyri Ferðslutrygd síðani 23. apríl 2003. Høgni í Stórustovu røkir formansstarvið til næsta ársfund, sum verður í apríl 2007.

# Føroyingar eru opnir og vinarligir




*Lars Krabbe, fotografur, og Carsten Ellegaard, journalistur, frá Jyllands-Posten sóu ikki nakað grindadráp, men her eru grind og spik til sølu í Vágsbotni*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Carsten Ellegaard, journalistur, og Lars Krabbe, fotografur, frá Jyllands-Post-en, sum komu higar í samband við viðjanina hjá rannsóknarskipinum Vædderen og Galathea3 verkætl-anina, hava í hesum døgum nógv føroyskt tilfar í teirra blað**

VITJAN
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Í samband við Galathea3 verkætlanina, sum danska avísin Jyllands-Posten hev-ur tikið stig til, hava ein foto-grafur og ein journalistur frá blaðnum verið í Føroyum og gjørt ymsikar frásøgnir um føroyska samfelagið. Tað eru Carsten Ellegaard, journalistur, og Lars Krabbe, fotografur, sum komu higar 10. august.

Endamálið hjá teimum var at skriva um Føroyar objektivt og uttan fordómar og royna at dekka føroyska samfelagið so breitt sum gjørligt. Lars Krabbe hevur einaferð fyrr verið í Føroyum, tað var síðst í 80-unum í samband at Føroyar komu við í evropeiskan fótbólt. Carsten Ellegaard hevur ikki verið í Føroyum fyrr. Teir eru báðir búsitandi í Keypmannahavn.

Lars og Carsten vóru á Ovastevnuni í Nólsoy, og sóu har hvussu ein bygdastevna gongur fyri seg, og til landsdyst á Svangaskarði. Teir hava t.d. vitjað á matstovum, tosa við føroyskum ungdóm, vitjað kristiligar samkomur, tosað við løgtingslimir og løgmann um viðurskiftir milum Føroya og restina av Evropa. Eisini vitjaðu teir sangkvinnuna Eivør Pálsdóttir í Gøtu og Bjørn Patursson bónda í Koltri.

Teir siga báðir, at hetta hava verið fantastiskir dagar. Tað var heilt annarleiðis, enn teir høvdu roknað við. Tit liva í einum nútímans samfelag, sum er umgyrt av eini framúr vakrari náttúru. Fólkið er opið og vinarligt í allar mátar, tað virkar sum at øll hava onkra søgu at siga. Tað einasta sum vit mangla er at síggja eitt grindadráp.

Nógv føroyskt tilfar er longu nú at finna í Jyl-lands-Postinum og á heima-síðuni: www.jp.dk undir "Ekspeditionen Galathea".

Meðan Lars Krabbe og Carsten Ellegaard fara heima aftur mikudagin, er Vædderen nú á veg til Grønlands. Har eru tað aðrir journalistar og fotografar, sum taka sær av at skriva um grønlendska samfelagið.

Sosialurin
Lesið Sosialin - so eru tit við